# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.04.2024 kl. 16:30 |
| **Málnr.:** | 21/01365 Gerðabók |
| **Nevndarlimir:** | Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø |
| **Varalimir:** | |
| **Ikki møtt:** | Annika S. Biskopstø hevði forfall |
| **Onnur:** | Rúni Rasmussen, kommunustjóri |
| **Protokollførari:** | Jensa Anthoniussen, fulltrúi |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 25/24 | 23/01320-15 | Byggisamtyktarbroyting fyri dagført uppskot til sølutorg, almenn vesi o.a. |
| 26/24 | 21/01949-15 | Eldradepil úti í Grøv, byggisamtykt |
| 27/24 | 24/00413-2 | Umsókn um undantaksloyvi til sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 607 |
| 28/24 | 24/00414-2 | Umsókn um frávik ísv. við sundurmatrikulering til eigaraíbúðir, matr.nr. 1316 |
| 29/24 | 23/01094-6 | Leingjan av leigusáttmála Café Fríða - ynski um fleiri ár |
| 30/24 | 23/01278-2 | Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024, Visit Norðoy – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 31/24 | 24/00315-1 | Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024 – *seinna viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 32/24 | 21/01818-3 | Møguligt keyp av lendi |
| 33/24 | 24/00328-6 | Fyriskipan av leiguøki |
| 34/24 | 24/00292-2 | Meirøki |
| 35/24 | 23/00770-5 | Makaskifti/meirøki |

KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

## <u>25/24</u>
## <u>23/01320-15 Byggisamtyktarbroyting fyri dagført uppskot til sølutorg, almenn vesi o.a.</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 15.04.2024 | 21/24 |
| 2 Heilsunevndin | 15.04.2024 | K-7/24 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.04.2024 | 34/24 |
| 4 Mentanarnevndin | 16.04.2024 | 36/24 |
| 5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.04.2024 | K-7/24 |
| 6 Havna- og Vinnunevndin | 17.04.2024 | 14/24 |
| 7 Tekniska Nevnd | 17.04.2024 | 22/24 |
| 8 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 25/24 |

**<u>23/01320-15 Byggisamtyktarbroyting fyri dagført uppskot til sølutorg, almenn vesi o.a.</u>**

**<u>Frágreiðing um málið:</u>**
Í samband við gerð av nýggjum økisparti E5, ið skal rúma útfylling við bygningi at rúma sølutorgi, almennum vesum, hølir til áhugafelagsskapir og bústaðir, hevur umsitingin saman við arkitektum dagført skitsuuppskotið við atliti at ferðsluviðurskiftunum í økinum. Víst verður til samtykt í FeN 13. nov. 2023 *“Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-11-2023, og mælir til, at ferðsluligu viðurskiftini (parkering og atkomuviðurskifti) verða betur lýst.”.*

Umsitingin hevur økt um E5 økið, hetta er gjørt fyri at tryggja neyðugt pláss til bygningin, ferðsluviðurskiftini t.d. til- og frákoyring, og økt um parkeringsmøguleikarnar (fyribilsparkering). Uppskotið, ið varð víst fram á býráðsfundi 23. nov. 2023, var uml. 1400 m$^2$, dagførda uppskotið er uml. 2000 m$^2$ til støddar (sí dagført økisblað)




*E5*

Vinaliga sí dagført uppskot: Síða 8 vísir, hvussu ferðslan verður skipað í økinum.

- Atlit er tikið at virkseminum hjá EFFO, við at økið er útlagt til rusk- og vørumóttøku og ein serskilt bíðirøð til vaskihøllina.
- Longst móti sjónum er vegbreyt og vendipláss ætlað til virksemi í bygningunum á útfyllingini. Vegbreytin førir somuleiðis til serskilt parkeringspláss hjá tangabilinum hjá EFFO.

- 6 eyka parkeringspláss verða tøk, til bygt verður á sunnara síðu á útfyllingini.
- Tils. verða uml. 14 parkeringspláss, samanborið við 10 í fyrra uppskotinum.

Skraveraða økið á uml. 155 $m^2$ sunnanfyri EFFO verður útlagt til parkering og bryggju í fyrstu atløgu. Tað kann blíva eitt framtíðarbyggiøki, tá ið EFFO ikki longur hevur virksemi ísb. við tangabil og til- og frákoyring.

**Burðardygd og heimsmálini:**
11. Mál. Gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Uml. 5000-8000 kr. at lýsa fyri byggisamtyktarbroyting.

**Tilmæli:**
Dagført uppskot verður lagt fram.
Mælt verður til at játta umsitingini heimild at fara undir byggisamtyktartilgongdina.

**Ferðslunevndin 15. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við ferðsluliga partinum av málinum.

**Heilsunevndin 15. apríl 2024:**
Ein meiriluti, Eyðstein Ó. Poulsen og Gunvá við Keldu, tekur undir við tilmælinum, dagfest 21-03-2024.
Ein minniluti, Annika S. Biskopstø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-03-2024.

**Mentanarnevndin 16. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 15-04-2024

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 16-04-2024.

**Havna- og Vinnunevndin 17. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-03-2024.

**Tekniska Nevnd 17. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 17-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
Tilmælið frá TN 17-04-2024 einmælt samtykt.

## 26/24
## 21/01949-15 Eldradepil úti í Grøv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.04.2024 | 35/24 |
| 2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.04.2024 | 17/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2024 | 27/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 26/24 |

**21/01949-15 Eldradepil úti í Grøv**

**Frágreiðing um málið:**
Umsitingin og NBH hava havt sparringsfundir ísb. við ætlaða eldradepilin og eru komin fram til eina arbeiðsætlan, har umsitingin arbeiðir við byggisamtyktarbroytingini og neyðugu góðkenningum, samstundis verður samstarvað við NBH um eina byggiskrá fyri komandi eldradepilin og eldrabústaðirnar. Tá ið byggisamtyktin er góðkend, og byggiskráin liðug, er ætlanin at hava eina innbodna arkitektakapping, sum tekur støði í byggiskránni, byggisamtyktini osv. Úrslitið av tí verður eitt skitsuuppskot til nýggja eldradepilin og eldrabústaðirnar.

Tilmæli um byggiskrá og tilgongdina við arkitektakapping verður lýst nærri seinni. Í hesum tilmæli verður einans byggisamtyktin viðgjørd.

Upprunauppskotið fyri byggisamtyktina á Gravarbø legði upp til, at eldradepil og eldrabústaðirnir vóru útløgd sum hvør sín økispartur, men eftir nærri granskan og viðgerð metir umsitingin, at hesi endamál kunnu rúmast innan sama økispart.
Av tí at kommunan og NBH ikki kenna endaliga vavið á eldradeplinum og bústøðunum, so kemur tað at geva størri frælsi ísb. við innrættan av økinum, at hesi liggja í sama stóra økisparti.

Í upprunauppskotinum varð norðari bøurin skipaður til fríøki (D-øki) og alment endamál (C-øki), umsitingin metir, tað er betri í fyrstu atløgu at lata henda part liggja um fríøki, til kommunan hevur eina meira ítøkiliga ætlan við økispartinum. Hetta kann blíva tikið upp ísb. við endurskoðanina av byggisamtyktini.



*Nýtt uppskot til økispartar*

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál.11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
- Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu.
- Friðingarmyndugleikin og Skógfriðingarnevndin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Keyp av lendi og samsýning til hugskots-/arkitektakapping verður fíggjað í samráð við NBH og lýst og viðgjørt seinni.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at heimila umsitingini at fara undir byggisamtyktartilgongdina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-04-2024.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 15-04-2024.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við E&B 16-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
Tilmælið frá FíN 22-04-2024 einmælt samtykt.

## 27/24
## 24/00413-2 Umsókn um undantaksloyvi til sundurbýti í eigaraíbúðir, matr.nr. 607

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.04.2024 | 42/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 27/24 |

**24/00413-2 Umsókn um frávik í samband við sundurmatrikulering til eigaraíbúðir á matr.nr. 607**

**Frágreiðing um málið:**
Fyritøkan, sum hevur byggiloyvi til íbúðarbygning á matr.nr. 607 í Klaksvík, søkir nú um frávik frá ásetingini í Almennu Byggisamtyktini viðvíkjandi minsta mark grundøki pr. íbúð, - hetta fyri at útvega møguleika fyri at sundurmatrikulera til eigaraíbúðir. – Matrikulering til eigaraíbúðir er neyðug, um íbúðirnar skulu seljast.

Galdandi áseting fyri minsta mark grundøki er 150 $m^2$ grundøki pr. íbúð, meðan biðið verður um fráviksloyvi til grundøki 83 $m^2$ pr. íbúð.
Í 2022 er líknandi frávik játtað við Torvgøtu/Bumshamarsveg (minsta mark grundøki úr 200 $m^2$/íbúð til 90 $m^2$/íbúð)

Fakta um stykkið og byggisamtyktarligar ásetingar:
Matr.nr. 607, Kirkjubrekka 3
Vídd: 498 $m^2$

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Minsta mark vídd grundøki pr. íbúð: 150 $m^2$
...
Byggiloyvi er játtað til: Íbúðarbygning við 6 búeindum
Vídd grundøki pr. búeind: 83 $m^2$

Tekniska Umsiting hesar viðmerkingar til umsóknina:
Umframt skipaða heildarplanlegging av eini kommunu, er høvuðsandin í eini byggisamtykt at tryggja borgaranum opinleika og harvið vitan um, hvat kommunan ætlar ella loyvir í teimum ymisku økispartunum. Frávik frá reglunum í byggisamtyktini eigur tí at verða brúkt sum minst, og tá bert í undantaksføri. Hinvegin – broytir rákið ella býráðsins vilji seg í mun til galdandi reglur, er heimild í býarskipanarlógini fyri at broyta reglurnar, og eiga – í slíkum føri - stig at verða tikin til at fáa hetta gjørt....... aftur her, fyri at borgarin skal hava møguleika at kunna seg um broytingarnar og koma við møguligum viðmerkingum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Býarskipanarlógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, samantvinnað við samtyktir býráðsins frá

a) 30. juni 2022 um *byggisamtyktarbroyting fyri økispart A15 m.a. til at heimila lægri grundøkjavídd enn 150 $m^2$ fyri íbúðir, treytað av at byggingin annars uppfyllir øll krøv sambært galdandi reglum* og
*b)* 22. febr. 2024 við m.a. "*Klaksvíkar Kommuna ætlar at stimbra bústaðarmøguleikar í kommununi..........at kanna hvørji økir í kommununi kunnu tillagast við smærri frávikum, og eftirfylgjandi fara í gongd við at gera tillaging og broyting í almennu byggisamtyktini ....*"

mælir Tekniska Umsiting til, at tilgongdin við byggisamtyktarbroyting eftir prinsippinum í pkt. a verður sett í gongd skjótast gjørligt, galdandi fyri allar A-økispartar í býarøkinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
Tilmælið frá UBN 15-04-2024 samtykt við 9 atkvøðum fyri; ÓML var ikki til staðar undir atkvøðugreiðsluni.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 28/24
## 24/00414-2 Umsókn um frávik í samband við sundurmatrikulering til eigaraíbúðir á matr.nr. 1316, Garðavegur 50

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.04.2024 | 43/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 28/24 |

**24/00414-2 Umsókn um frávik í samband við sundurmatrikulering til eigaraíbúðir á matr.nr. 1316, Garðavegur 50**

**Frágreiðing um málið:**
Fyritøkan, sum hevur byggiloyvi til íbúðarbygning á matr.nr. 1316 í Klaksvík, søkir nú um frávik frá ásetingini í Almennu Byggisamtyktini viðvíkjandi minsta mark grundøki pr. íbúð, - hetta fyri at útvega møguleika fyri at sundurmatrikulera til eigaraíbúðir. – Matrikulering til eigaraíbúðir er neyðug, um íbúðirnar skulu seljast.

Galdandi áseting fyri minsta mark grundøki er 200 $m^2$ grundøki pr. íbúð, meðan biðið verður um fráviksloyvi til grundøki 88 $m^2$ pr. íbúð.
Í 2022 er líknandi frávik játtað við Torvgøtu/Bumshamarsveg (minsta mark grundøki úr 200 $m^2$/íbúð til 90 $m^2$/íbúð)

Fakta um stykkið og byggisamtyktarligar ásetingar:
Matr.nr. 1316, Garðavegur 50
Vídd: 355 $m^2$
Økispartur: A10
Minsta mark vídd grundøki pr. íbúð: 200 $m^2$
...
Byggiloyvi er játtað til: Íbúðarbygning við 4 búeindum
Vídd grundøki pr. búeind: 88 $m^2$

Tekniska Umsiting hesar viðmerkingar til umsóknina:
Umframt skipaða heildarplanlegging av eini kommunu, er høvuðsandin í eini byggisamtykt at tryggja borgaranum opinleika og harvið vitan um, hvat kommunan ætlar ella loyvir í teimum ymisku økispartunum. Frávik frá reglunum í byggisamtyktini eigur tí at verða brúkt sum minst, og tá bert í undantaksføri. Hinvegin – broytir rákið ella býráðsins vilji seg í mun til galdandi reglur, er heimild í býarskipanarlógini fyri at broyta reglurnar, og eiga – í slíkum føri - stig at verða tikin til at fáa hetta gjørt....... aftur her, fyri at borgarin skal hava møguleika at kunna seg um broytingarnar og koma við møguligum viðmerkingum.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Býarskipanarlógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandi, samantvinnað við samtyktir býráðsins frá

a) 30. juni 2022 um *byggisamtyktarbroyting fyri økispart A15 m.a. til at heimila lægri grundøkjavídd enn ásett fyri íbúðir, treytað av at byggingin annars uppfyllir øll krøv sambært galdandi reglum* og
*b)* 22. febr. 2024 við m.a. *"Klaksvíkar Kommuna ætlar at stimbra bústaðarmøguleikar í kommununi..........at kanna hvørji økir í kommununi kunnu tillagast við smærri frávikum, og eftirfylgjandi fara í gongd við at gera tillaging og broyting í almennu byggisamtyktini ...."*

mælir Tekniska Umsiting til, at tilgongdin við byggisamtyktarbroyting eftir prinsippinum í pkt. a verður sett í gongd skjótast gjørligt, galdandi fyri allar A-økispartar í býarøkinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
*Óli M. Lassen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá UBN 15-04-2024 einmælt samtykt.

## 29/24
## 23/01094-6 Leingjan av leigusáttmála Café Fríða - ynski um fleiri ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 17.04.2024 | 12/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2024 | 25/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 29/24 |

**23/01094-6 Leingjan av leigusáttmála Café Fríða - ynski um fleiri ár**

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar kommuna hevur áður játtað at leingja sáttmálan við Café Fríðu við 5 árum, frá tí at hann gongur út, og skuldi hann tískil ganga fram til 2031. Fyritøkan søkir nú um at fáa sáttmálan longdan við í minsta lagi 10 árum fyri at fáa tíð til, at gjørda íløgan kann gjaldast aftur.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Málið stuðlar undir 3. heimsmálið, sum er at virka fyri at tryggja øllum eitt heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tryggja inntøkur frá leigumáli í longri tíðarskeið

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til um Café Fríða kann fáa longt leigusáttmálan við 10 árum ella meiri.

**Havna- og Vinnunevndin 17. apríl 2024:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki við í viðgerðini vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-04-2024

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2024:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.*
Nevndin tekur undir við HaVN 17-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.*
Tilmælið frá FíN 22-04-2024 einmælt samtykt.

## 30/24
## 23/01278-2 Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024, Visit Norðoy – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.04.2024 | 28/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2024 | 24/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 30/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 30.05.2024 | |

**23/01278-2 Umsókn um stuðul - hækkað upphædd pr. íbúgva 2024 - Visit Norðoy**

**Frágreiðing um málið:**
VisitNorðoy fær í dag kommunalan stuðul frá limakommununum áljóðandi kr. 200,- pr. borgara. Við 5.490 borgarum er játtanin fyri 2024 kr. 1.098.000,-

Visit Norðoy hevur sent inn umsókn um at hækka borgaragjaldið frá kr. 200,- til kr. 500,- pr. borgara, grundað á teirra sannføring, at tað kostar uml. 3 mió. kr. at reka eina kunningarstovu, sum skal vera við til at lyfta Norðoyggjar og Klaksvíkina til at hava nógv áhugaverd og góð ferðavinnutilboð.

Tí vil fyrisitingin mæla til at hækka stuðulin til Visit Norðoy í tveimum umførum, soleiðis at stuðulin í ár hækkar við 150.- pr. borgara, og sama hækking verður givin í 2025.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Málið stuðlur uppundir 3. heimsmál at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein hækking av borgaragjaldinum á 150,- pr. borgara kostar kr. 823.500,- fyri 2024. Ongin avseting er til endamálið.

**Tilmæli:**
Fyrisitingin mælir til, at nevndin tekur støðu til at eykajátta stuðulin til Visit Norðoy við kr. 823.500,-. Verður at játta av *tøkum peningi*.

**Mentanarnevndin 16. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-04-2024

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN 16-04-2024.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
Tilmælið frá FíN 22-04-2024 einmælt samtykt.

## 31/24
## 24/00315-1 Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024 – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 11.03.2024 | |
| 2 Mentanarnevndin | 12.03.2024 | |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 12.03.2024 | |
| 4 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 12.03.2024 | |
| 5 Havna- og Vinnunevndin | 13.03.2024 | |
| 6 Tekniska Nevnd | 13.03.2024 | |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 20/24 |
| 8 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 24/24 |
| 9 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | 31/24 |

**24/00315-1 Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 21. mars 2024.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Tað er týdningarmikið, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í arbeiðið við eykajáttanum fyri 2024. Havast skulu í huga langtíðaravleiðingar í bæði rakstrarpartinum og íløgupartinum við atliti at burðardyggari menning av Klaksvíkar kommunu. Neyðugt er at tryggja, at grundleggjandi tænastur til borgarar og onnur í kommununi verða tryggjaðar á haldførari grund, og at íløgur taka støði í tøka fíggjarliga tilfeinginum og í framtíðartørvinum í kommununi.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Samlaða upphæddin á eykajáttanaryvirlitinum er 20,2 mió. kr. Afturat hesum kemur eykajáttanin til Varpið á 3 mkr., sum varð játtað í býráðnum februar.

Um kommunan samtykkir eykajáttanirnar, verður neyðugt við lántøku – í hvussu er 10 mkr.
Afturat hesum verður neyðugt at útvega fígging ísbv. avdráttirnar 2024 fyri 13 mió. kr. – antin við lántøku ella skáum. Tað er treytað av, at fíggjarætlanin 2024 heldur, og at einki óvæntað stingur seg upp.

Víst verður til avtaluna við Fíggjarmálaráðið frá 2021, at lántøkurnar hjá kommununi eru góðkendar við teirri treyt, at kommunan kemur undir eina álíkning við ársenda 2024.
Um hetta ikki eydnast, og Fíggjarmálaráðið heldur fast við kravið um nettoskuldina, so kann verða trupult at leggja fíggjarætlan fyri 2025 og frameftir.
Tí eiga eykajáttanirnar at verða avstemmaðar við metta roknskap 2024 og fíggjarætlanina 2025 og helst nøkur ár fram (langtíðarætlan).

**Tilmæli:**
Við hesum verður tilmæli um eykajáttanir 2024 lagt fyri avvarðandi nevndir og Býráð til viðgerðar og støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 11. mars 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL og JCC, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.
SVJ og JS taka støðu í býráðnum.

**Mentanarnevndin 12. mars 2024:**
Ein meiriluti, JCC, ASJ, GvK og ÓML, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 12. mars 2024:**
Málið er til viðgerð og ikki til kunning.
Ein meiriluti, EyÓP, JCC og ASJ taka undir við MeN, dagf. 01-03-2024. Tó við tí rætting, at játtanin til Námsfrøðiligu Ráðgevingina verður 548.000.
Ein minniluti, JS og TJL taka støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 12. mars 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL og JCC, taka undir við meirilutanum í TrN B&U, dagf. 12-03-2024.
Ein minniluti, SVJ og ASB, taka støðu í býráðnum.

**Havna- og Vinnunevndin 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dgf. 01-03-2024.

**Tekniska Nevnd 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, tó við hesum viðmerkingum:

- víst verður til samtyktina í máli 18/24 fyrr á fundinum *Barnaansingartilboð til barn við serligum tørvi*, har nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, men mælir til at taka spurningin um gjald til Power Care upp við Almannaverkið
  at 300.000 kr. verða veittar til verkætlanina "Undirsjóvarakvarium" á Norðoyri (mál nr. 23/01222)

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá FíN 19. mars 2024; tað varð samtykt 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL, ÓML og ASB) og ongari atkvøðu ímóti. SVJ atkvøddi ikki.

**Klaksvíkar Býráð 24. apríl 2024:**
Tilmælið frá BýR 21-03-2024 samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL og ÓML) og ongari ímóti; SVJ atkvøddi ikki.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 32/24
## 21/01818-3 Møguligt keyp av lendi

## 33/24
## 24/00328-6 Fyriskipan av leiguøki

## 34/24
## 24/00292-2 Meirøki

## 35/24
## 23/00770-5 Makaskifti/meirøki

*Fundurin lokin kl. 18:00*